MÁLRÁÐIÐ

# ÁRSFRÁGREIÐING 2025



# Innihaldsyvirlit


Inngangur . . . . . . . . . . 3

Endamál . . . . . . . . . . 5

Limirnir í Málráðnum . . . . . . . . . . 6

Starvsnevndin . . . . . . . . . . 8

Málstovan . . . . . . . . . . 8

Ráðgeving . . . . . . . . . . 10

Fundir í Málráðnum . . . . . . . . . . 11

Teknmál . . . . . . . . . . 12

Hendingar í 2025 . . . . . . . . . . 13

Samstarv . . . . . . . . . . 14

Roknskaparárið 2025 . . . . . . . . . . 15

# Inngangur

## NÝTT RÁÐ TEKUR VIÐ

Virksemið í Málráðnum og á Málstovuni í 2025 hevur verið merkt av manglandi arbeiðsorku, umskipanum og broytingum. Hendan ársfrágreiðingin tekur støði í seinnu hálvu av 2025, tá ið nýtt málráð tók við. Í ársfrágreiðingini fyri 2024 hevur forfólkið í undanfarna málráðið skrivað um fyrru hálvu av 2025.

Í 2025 tók nýtt málráð við. Setan hjá nýggja málráðnum er frá 1. august 2025 til 31. juli 2029. Sambært lógini um málráð tilnevnir landsstýrismaðurin ellivu limir í Málráðið, sum síðani skipar seg við eini starvsnevnd við fimm limum. Limirnir verða tilnevndir eftir tilmæli frá ymiskum feløgum og stovnum, og harumframt velur landsstýrismaðurin tveir limir. Við hesi skipan verður tryggjað, at ráðið er breitt umboðað og fevnir um ymisk faklig og samfelagslig sjónarmið. Millum limirnar tilnevnir landsstýrismaðurin eisini forfólk og næstforfólk. Í hesi setu er Beinir Bergsson forfólk, og Lena Reinert er næstforfólk.

13. august hevði landsstýrismaðurin fund við nýggja málráðið í Almanna- og mentamálaráðnum. Á fundinum varð víst á arbeiðið, sum er gjørt seinastu árini, m.a. Stavsetingarorðabókin og nýggja heimasíðan.

## MÁLRÁÐIÐ NÝGGJ HØLI

Ein av fyrstu uppgávunum hjá nýggja málráðnum var at finna eina loysn til hølisumstøðurnar hjá Málstovuni, sum í eitt tíðarskeið einki skrivstovuhøli hevði.

29. august 2025 varð samstarvsavtala undirskrivað millum Málráðið og Fróðskaparsetur Føroya í nýggju hølunum í Havn. Avtalan varð undirskrivað av Eiriki í Jákupsstovu, landsstýrismanni í almanna- og mentamálum, og Beini Bergssyni, forfólki, fyri Málráðið, og Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum, og Bergi D. Hansen, dekani, fyri Fróðskaparsetur Føroya.

Avtalan tryggjar Málráðnum støðugar arbeiðs- og hølisumstøður og umsitingarligan stuðul. Í hesum sambandi flutti skrivstovan hjá Málráðnum, Málstovan, í septembur í høli hjá Fróðskaparsetrinum í J.C. Svabos gøtu 7 í Havn, har hon nú húsast saman við øðrum starvsfólki á Setrinum.

Við avtaluni fær Málstovan atgongd til fyrisitingarligan stuðul frá Fróðskaparsetrinum, og starvsfólkini fáa somuleiðis møguleika at taka lut í førleikamennandi skeiðum á jøvnum føti við starvsfólk á Fróðskaparsetrinum.

Samstundis verður fíggjarliga umsitingin skipað soleiðis, at fíggjardeildin á Fróðskaparsetrinum umsitur játtanina, meðan Málráðið framvegis er sjálvstøðugt og tekur avgerðir um egna raðfesting. Samstarvið byggir á eitt longu áralangt fakligt samband millum Málráðið og Fróðskaparsetrið, og við nýggju avtaluni verða betri karmar lagdir fyri samstarvi um m.a. tøkni, tiltøk og ráðstevnur.

## MÁLFRØÐINGAR Í STARVI

Ein annar liður í at fáa Málstovuna virkna aftur var at seta ein fyribils málsligan ráðgeva, eftir at undanfarni segði seg úr starvi. Málráðið setti John Mikkelsen, sum m.a. læt svartænastuna upp aftur í februar við at svara telefonini hjá Málstovuni. Talan var um eitt tíðaravmarkað starv, og í septembur søkti Málráðið eftir nýggjum málsligum ráðgeva og setti Mariu Finnbogadóttur Arge í starv. Hon hevur hugsavnað seg um at skipa gerandisdagin í nýggju hølunum, seta seg inn í eldri og nýggj mál, og síðan hevur hon havt máltænastuna um hendi. Ein stórur partur av hesum arbeiðinum hevur eisini snúð seg um at svara borgarum og almennum stovnum, sum hava sent inn málsligar spurningar, meðan máltænastan var afturlatin. Máltænastan er opin tríggjar dagar um vikuna. Nýggja málráðið ætlar at víðka um svartíðirnar, tá arbeiðsorkan er størri á Málstovuni. Hetta verður væntandi í 2026.

Tann seinasta ársfjórðingin vóru fleiri málfrøðingar settir í tíðaravmarkað starv fyri at gera uppgávur, sum hava ligið á láni. Hesir málfrøðingarnir vóru Sandra Saxov Lamhauge, Uni Johannesen og John Mikkelsen. Teirra arbeiðsuppgávur fevndu m.a. um at endurskoða og dagføra ymiskar mannagongdir og skipa eldri tilfar, so tað hóskar til talgilding. Eisini arbeiddu tey við at rætta ymiskar villur, sum vóru á heimasíðuni hjá Málráðnum. Teir arbeiddu við at gera eldri málspurningar talgildar. Gamla tíðarritið *Orðafar* varð eisini lagt út á heimasíðuna hjá Málráðnum.

Arbeiðið í Málráðnum og á Málstovuni hevur í stóran mun snúð seg um at fáa virksemið í gongd aftur.

Hetta er trettanda ársfrágreiðing, ið Málráðið letur úr hondum síðan stovnanina 1. januar 2013. Ársfrágreiðingarnar eru at finna á heimasíðu okkara www.malrad.fo.

*Beinir Bergsson, forfólk*

# Endamál

**Málráðið hevur sum endamál** at røkja, menna og verja føroyska málið, at vegleiða, ráðgeva og gera niðurstøður í málspurningum og at áseta føroyska stavseting. Málráðið skal harumframt serskilt røkja, menna og verja føroyska teknmálið. Málráðið skal savna og skráseta nýkomin orð, máliskur, framburðir og onnur málslig fyribrigdi í føroyskum og vera til hjálpar at velja og evna til nýggj orð. Sama er eisini galdandi fyri føroyskt teknmál.

**Málráðið gevur landsstovnum** og almenningi vegleiðing, ráð og upplýsing í spurningum um føroyskt mál í skrift og talu eins og um føroyskt teknmál. Almennir myndugleikar eiga í størst møguligan mun at fylgja niðurstøðunum hjá Málráðnum.

**Málráðið eigur at samstarva** við fjølmiðlar, stovnar og almennar myndugleikar, ið hava stóra málsliga ávirkan. Í sambandi við yrkisbólkar skal Málráðið menna gott føroyskt yrkismál og annars skipa fyri átøkum málinum at frama.

**Málráðið røkir Stavsetingarorðabókina**, sum er løggild av landsstýrinum, og sum almennir myndugleikar skulu fylgja. Málráðið er málrøktar- og málmenningarstovnur, skipaður undir landsstýrinum og í virksemi sínum óheftur av politisku skipanini.



# Limirnir í Málráðnum

**Nýtt málráð tók** við 1. august 2025, og setanin gongur út 31. juli 2029. Lena Reinert og Bergur Rasmussen eru afturvaldir málráðslimir.

Limirnir í nýggja Málráðnum eru:



**Beinir Bergsson,** *forfólk*
Valdur eftir tilmæli frá Javnstøðunevndini



**Lena Reinert,** *næstforfólk*
Vald eftir tilmæli frá Staðarnavnanevndini



**Hjalmar P. Petersen,** *starvsnevndarlimur*
Valdur eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya



**Sigmund Jógvansson,** *starvsnevndarlimur*
Valdur eftir tilmæli frá felagnum Føroyamál



**Sonja Winthereig,** *starvsnevndarlimur*
Vald eftir tilmæli frá Námi



**Bergur Rasmussen,** *málráðslimur*
Valdur eftir tilmæli frá Rithøvundafelagi Føroya



**Edny Poulsen,** *málráðslimur*
Vald eftir tilmæli frá Deyvafelagnum og HOYR



**Iben Nyholm Debess,** *málráðslimur*
Vald av landsstýrismanninum



**Niels Jákup Thomsen,** *málráðslimur*
Valdur av landsstýrismanninum



**Sanna Andrassdóttir Dahl,** *málráðslimur*
Vald eftir tilmæli frá Navnanevndini



**Solby A. Christiansdóttir,** *málráðslimur*
Vald eftir tilmæli frá Mentanargrunni Landsins

## FRÁFARANDI MÁLRÁÐ

Fráfarandi málráð tók við 1. juli 2021 og sat til 1. august 2025, tá nýtt málráð tók við. Limirnir í fyrrverandi Málráði vóru:

**Helena Kannuberg,** *forfólk*
**Randi Kúrberg,** *næstforfólk*
**Rakul Skaale Andreasen,** *starvsnevndarlimur*
**Elin Henriksen,** *starvsnevndarlimur*
**Theodor Eli Dam Olsen,** *starvsnevndarlimur*
**Meifríð Weihe Hansen,** *málráðslimur*
**Eyðun á Borg,** *málráðslimur*
**Bergur Rasmussen,** *málráðslimur*
**Lena Reinert,** *málráðslimur*
**Heri Jógvan Joensen,** *málráðslimur*
**Johan Blábjørg,** *málráðslimur*

# Starvsnevndin

**Starvsnevndin í fyrru hálvu** var mannað við hesum limum í Málráðnum: Rakul Skaale Andreasen, Elin Henriksen og Theodor Eli Dam Olsen. Helena Kannuberg sat sum forfólk í 2021-2023 og Randi Kúrberg sum næstforfólk, men frá 2023-2025 sat Randi Kúrberg sum forfólk og Helena Kannuberg sum næstforfólk. Lena Reinert sat sum varalimur í starvsnevndini í 2024, tá Elin Henriksen fór úr starvsnevndini.

Hesir limir manna starvsnevndina í seinnu hálvu: Beinir Bergsson, forfólk, Lena Reinert, næstforfólk, Hjalmar P. Petersen, Sonja Winthereig og Sigmund Jógvansson. Harumframt hevur Sanna A. Dahl verið á starvsnevndarfundi í novembur sum varalimur, tá ið einum av hinum starvsnevndarlimunum barst frá.

# Málstovan

**Málstovan er umsiting** hjá Málráðnum og veitir einstaklingum og stovnum málsliga vegleiðing. Øll eru vælkomin at skriva til Málstovuna á malrad@malrad.fo ella at ringja á tlf. +298 312397. Telefontíðin hjá Málstovuni er mánadag, týsdag og hósdag kl.10-12. Til ber eisini at senda spurningar við at fylla ein frymil út á heimasíðuni hjá Málráðnum, www.malrad.fo.

Málstovan heldur til í J.C. Svabos gøtu 7 í Havn.

**Hesi hava starvast á Málstovuni í 2025:**



**Kristin M. Magnussen**
*málfrøðingur*



**Maria Finnbogadóttir Arge**
*málsligur ráðgevi*



**Ingibjørg Oddmarsdóttir Petersen**
*skrivari*



**John Mikkelsen**
*málfrøðingur í tíðaravmarkaðum starvi*



**Sandra Saxov Lamhauge**
*málfrøðingur í tíðaravmarkaðum starvi*



**Uni Johannesen**
*málfrøðingur í tíðaravmarkaðum starvi*

# Ráðgeving

**Týðandi partur av virkseminum** hjá Málráðnum er málsliga ráðgevingin. Vegna vantandi arbeiðsorku hevur máltænastan verið skerd í 2025. Telefonin hjá máltænastuni læt upp aftur í februar 2025, og í oktobur 2025 bar aftur til at senda skrivligar málspurningar inn. Tá máltænastan hevur verið stongd, hava vit merkt ein eftirspurning eftir máltænastuni. Av tí at máltænastan hevur verið skerd í 2025, ber ikki til at framleiða hagtøl, sum eru umboðandi fyri alt 2025. Hóast hetta, so sæst týðiliga, at meginparturin av málspurningunum hoyra til flokkingina týðing.

Málspurningar, sum hoyra til flokkingina *Týðing*, kunnu eitt nú vera spurningar um, hvussu einstøk útlendsk orð eita á føroyskum, men teir kunnu eisini snúgva seg um týðingar av yrkisorðalistum. Í flestu førum verður orðasmíð flokkað undir *Týðing*, av tí at tað snýr seg um at finna eitt føroyskt nýggjyrði fyri útlendskt hugtak. Tørvurin á málsligari ráðgeving er stórur, og serliga málamótið við enskt og danskt krevur áhaldandi, at føroysk nýggjyrði verða gjørd, og at tøkuorð verða lagað til føroyska bending og stavseting. Summi sløg av spurningum metir Málráðið vera uttanfyri virkisøkið hjá máltænastuni ella ov truplar og tíðarkrevjandi at loysa.

Áhugavert er eisini at hyggja eftir, úr hvørjum málum týðingarnar eru. Í ársfrágreiðingini fyri 2019, sum var seinasta ársfrágreiðing, sum hevði hagtøl um upprunamálini av týð-

## TÝÐINGAR



ingunum, stendur at lesa, at 59 % av týðingunum vóru úr donskum, meðan 34 % vóru úr enskum. 7 % vóru úr øðrum málum, eitt nú týskum og íslendskum. Samanbera vit hesi tølini við hagtølini frá 2025, sæst ein týðilig broyting; 54 % av týðingunum eru nú úr enskum, meðan 32 % av týðingunum eru úr donskum. 4 % av týðingunum eru úr øðrum málum, meðan 11 % snúðu seg um orðasmíð.

# Fundir í Málráðnum

**Í 2025 vóru fimm fundir** í Málráðnum: 27. mars, 19. juni, 22. august, 5. novembur og 10. desembur. Limirnir í Málráðnum hava fingið fundarfrásøgnina til viðmerkingar, eftir at fundur hevur verið. 10 starvsnevndarfundir hava verið í 2025. Limirnir í Málráðnum fáa eisini frásagnirnar frá fundunum í starvsnevndini, tá ið tær eru góðkendar. Hetta verður gjørt, fyri at allir limir í Málráðnum skulu verða kunnaðir um virksemið á Málstovuni og í starvsnevndini, og fyri at málráðslimirnir skulu kunna gera vart við seg, um teir hava viðmerkingar til mál og evni, sum eru til viðgerðar í starvsnevndini. Starvsnevndarfundirnir eru síðsta mikudag í mánaðinum.

Fundarvirksemið í fyrru hálvu av 2025 snúði seg í høvuðsheitum um samstarvsavtaluna við Fróðskaparsetur Føroya. Áðrenn summarsteðgin bjóðaði táverandi landsstýrismaður fráfarandi málráði á fund um støðuna í Málráðnum.

Fyrsti fundur hjá nýggja málráðnum var í august. Á fundinum kunnaði Fróðskaparsetrið um nýggju samstarvsavtaluna millum Føroyamálsdeildina og Málráðið. Harafturat varð nýggj starvsnevnd sett. Sjøtul varð eisini settur á arbeiðið um at seta eina teknmálsnevnd.

Á fundinum í novembur heitti formaðurin á limirnar í Málráðnum um at skriva eina grein hvør til heimasíðuna hjá Málráðnum. Ætlanin er, at ein grein verður løgd út um mánaðin. Limirnir velja sjálvir evni. Nýggjorðalistin var eisini á skrá á fundinum. Nýggjorðalistin er ein listi við uppskotum um nýggj orð. Hetta fevnir um orð, sum Málráðið hevur viðmælt, týtt ella smíðað. Málráðið samtykti at raðfesta arbeiðið við nýggjorðalistanum, og Sandra S. Lamhauge, málfrøðingur í tíðaravmarkaðum starvi, hevur gjørt okkurt fyrireikandi arbeiði.

Í desembur var eykafundur hildin, har fylgibólkur til Stavsetingarorðabókina varð settur. Hjalmar P. Petersen, Iben Nyholm Debess og Solby A. Christiansdóttir manna fylgibólkin saman við ritstjóranum, Kristini M. Magnussen, á Stavsetingarorðabókini. Lena Reinert er varaumboð.



Á fundinum var uppskotið frá Tilfeingis- og vinnumálaráðnum um broyting í lógini um útbjóðing eisini umrøtt. Uppskotið legði upp til, at undantøk kunnu gerast frá kravinum um, at útbjóðingartilfar skal vera á føroyskum máli. Málráðið tekur ikki undir við uppskotinum um lógarbroytingina, og í sambandi við hetta skrivaðu formaðurin og næstforkvinnan eitt skriv, sum kann lesast her: Føroyskt er eingin forðing! - Málráðið

# Teknmál

Tær 100.000 kr., sum eru oyramerktar til teknmál, fóru til verkætlanina SignWiki, sum er ein talgild teknmálsorðabók. Eins og undanfarna málráð vil nýggja málráðið raðfesta arbeiðið við teknmáli. Tó avgjørdi ráðið at skipa tað øðrvísi í 2026. Nýggja ráðið gjørdi av at seta ein arbeiðsbólk fyri teknmál í 2026, sum kann arbeiða við somu fíggjing, og sum kann fyrireika mál til Málráðið. Hetta er ein liður í at geva fólki, ið brúka teknmál, møguleika at ávirka, hvussu Málráðið kann arbeiða føroyska teknmálinum at frama. Hesi manna arbeiðsbólkin: Edny Poulsen, Eyðgunn Hansen, Ásmund Reyðberg og Høgni Leitisstein.

Tað var umráðandi at hava javna umboðan í arbeiðbólkinum; øll í bólkinum duga teknmál, onnur helvtin av bólkinum eru hoyrandi, og hin helvtin eru deyv. At hava javna kynsumboðan var eisini havt í huga, tá ið bólkurin varð tilnevndur, og við í bólkinum eru tvær kvinnur og tveir menn. Formaðurin í Málráðnum er við sum skrivari á hvørjum fundi hjá arbeiðsbólkinum.

# Hendingar í 2025

## MÓÐURMÁLSDAGUR

Móðurmálsdagurin varð hátíðarhildin í Smæruni í Havn 25. mars. Yvirskriftin og evnið fyri móðurmálsdagin var *„Tað viti vitlíki"*. Føroyamál var stigtakari og hevði boðið Málráðnum við sum samstarvsparti. Edny Poulsen og Eyðgunn Hansen høvdu stutta framløgu vegna Málráðið um arbeiðið við føroysku teknmálsorðabókini, *SignWiki*. Tiltakið varð teknmálstulkað.

## STAVRAÐIÐ

Í 2025 legði Sambandsflokkurin fram eitt lógaruppskot um at víðka føroyska stavraðið við nýggjum bókstavum, serliga fyri at laga málið betur til altjóða nøvn og orð. Uppskotið fekk nógva umrøðu og varð ein partur av einum størri kjaki um føroyskan málpolitikk og málmenning.

Í hesum sambandi var Málráðið eisini til hoyringar, og Málstovan brúkti munandi arbeiðsorku upp á at viðgera og arbeiða við málinum í hesum høpi. Hetta arbeiðið fevndi um at finna vísindaligt tilfar fram um føroyska stavraðið og at knýta hetta málið at eldri kjakum um tað føroyska stavraðið. Málráðið orðaði eitt hoyringarskriv, men málið varð tikið av skrá, so hoyringarskrivið varð ongantíð sent Løgtinginum.

## ÁRSINS ORÐ

Hetta er 10. árið, at Málráðið samstarvar við Kringvarpið um ársins orð. Ein og undanfarin ár valdi Málráðið 10 orð út. Hetta endaði við einari sending 15. desembur, tá ið ársins orð varð valt. Sendingin varð send í Kringvarpinum. At viðgera og velja ársins orð vóru umboð fyri Málráðið, Føroyamál og Føroysk miðlafólk. Orðini í uppskoti til ársins orð vóru hesi:

> *6-7 (six-seven, seks-sjey), fiksirúm, hekkuportur, linjuføring, nossa-nuggets, preppa, reglulýdni, skíggjasunn, suðuroyartunnil, vøruskott.*

Ársins orð varð *suðuroyartunnil*.

## VERKSTOVA UM VITLÍKI

Í desembur í 2025 varð Málráðið boðið við á verkstovuna *Føroyskt fyrst*; ein verkstova um støðuna hjá føroyska málinum og mentanini í vitlíkisøldini. Verkstovan er ein partur av einari forkanning til eina landsfevnandi heildarætlan um vitlíki, sum Talgildu Føroyar skipa fyri vegna Fíggjarmálaráðið. John Mikkelsen og Uni Johannesen, starvfólk á Málstovuni, umboðaðu Málráðið á verkstovuni.

## MÁLRÁÐIÐ GRANNSKOÐAÐ

Í desembur grannskoðaði Landsgrannskoðarin rakstrarjáttanina hjá Málráðnum. Í 2025 var játtanin 2, 5 mió. kr. Í hesum sambandi vóru Beinir Bergsson, formaður, Ingibjørg O. Petersen, skrivari, og Odd Arild Bjellvåg, fíggjarleiðari á Fróðskaparsetri Føroya, á fundi við Landsgrannskoðanina.

# Samstarv

**Málráðið samstarvar** við málnevndirnar í hinum Norðurlondunum í netverkinum NSN. Norðurlendska málráðssamstarvið (NSN) samskipar samstarvið millum málráðini. Málráðið tekur vanliga lut á ársfundum.

Nýggj strategi varð gjørd fyri norðurlendska samstarvið fyri 2025-2029. Visjónin í strateginí er týdd til øll luttakandi mál. Á føroyskum ljóðar hon soleiðis: *„Netverkið fyri norðurlendsku málnevndirnar skal vera ein týðandi og sjónligur viðleikari í málsamfelagnum. Netverkið skal við samstarvi og sínámillum vitanarbýti virka fyri, at tey samfelagsberandi málini í Norðurlondum áhaldandi skulu vera fult virkisfør á øllum økjum og fyri at menningin av landanna minnilutamálum, málum hjá upprunafólki og teknmáli, verður studd og styrkt. Aftur at tí virkar netverkið fyri at styrkja tann skandinaviska málfelagsskapin.“*

Í 2025 hava starvsfólk og limir í Málráðnum verið á ymsum fundum og ráðstevnum uttanlands.

Ársfundurin hjá NSN var í Vejle í Danmark. Lena Reinert og John Mikkelsen vóru á fundi vegna Málráðið. Sum vanligt er annaðhvørt ár, so var ársfundurin lagdur saman við eini ráðstevnu, hesa ferð leksikografiráðstevnuni, har Jógvan í Lon Jacobsen, professari á Føroyamálsdeildini, helt ein høvuðsfyrilestur. Framløgurnar hjá ávikavist Málráðnum og Føroyamálsdeildini koma út sum grein í SiN og LexicoNordica í 2026. Samstundis var ársfundur í teknmáli hildin, har umboð hjá Málráðnum tóku lut.

## GREIÐMÁL

Síðan seint í 2024 hevur Málráðið havt umboð í norðurlendska greiðmálsnetverkinum. Netverkslimirnir hava javnan fund á netinum, men í sambandi við fyriskipanina av ráðstevnu í mars vóru flestu limirnir á fundi í Helsingfors í Finnlandi.

## AD HOC-BÓLKUR

Seminar var eisini í Finnlandi við heitinum *„Kan digitalisering rädda nordisk språkförståelse?“* Í sambandi við seminarið helt ad hoc-bólkurin fund 1. apríl við umboðum úr Norðanlondunum. Helena Kannuberg luttók á fundinum vegna Málráðið.

## NORDTERM

Í juni var ráðstevna í Reykjavík í Íslandi, sum samstarvsbólkurin *Nordterm* skipaði fyri. Heitið á ráðstevnuni var *„Felags heiti“*. Kristin M. Magnussen luttók vegna Málráðið.

## MÁLTØKNI

Málráðið hevur latið Máltøknideplinum spurningar frá svartænastuni, so Máltøknidepilin kann gera eitt kjattmenni, sum er fyribils bert til innanhýsis nýtslu.

## SOSIALIR MIÐLAR

Í 2025 hevur Málráðið verið sjónligt á teimum sosialu miðlunum. Tá ið fyrrverandi málsligi ráðgevin, Henry á Fríðriksmørk, segði seg úr starvi, valdi táverandi málráð at fara undir eina samstarvsavtalu við hann um framhaldandi at røkja Facebook-síðuna hjá Málráðnum. Hetta arbeiðið hevði við sær at leggja út fýra uppsløg um mánaðin. Nýggja Málráðið valdi at halda fram við samstarvinum til árslok.

# Roknskaparárið 2025

**Játtanin hjá Málráðnum** var 2.471.000 kr. í 2025. Samlaðu útreiðslurnar vóru 2.343.205 kr. Játtanin hevur hildið við einum avlopi á lønum. Til samans er avlopið 5 % ella umleið 127.000 kr.

Undanfarna ár, í 2024, vórðu 250.000 kr. fluttar frá høvuðskontuni *Orðabókagerð* til Málráðið til rættlesing av løggildu *Stavsetingarorðabókini*. Í 2025 varð upphæddin flutt aftur til høvuðskontuna *Orðabókagerð*. Eitt av tilmælunum, sum var handað táverandi landsstýriskvinnu, Sirið Stenberg, á vári 2024, var at styrkja umsitingina. Tí varð játtanin fyri 2025 hækkað við 600.000 kr.

Hóast endamálið við játtanini var at styrkja umsitingina í 2025, er avlop á lønarkontuni. Orsøkin er bygnaðarbroytingar og hølisumstøður. Hóast málráðsarbeiðið hevur verið avmarkað, so hava lønarútreiðslur verið til verkætlanarsett starv í máltøkni og tíðaravmarkað størv at arbeiða við stavsetingarreglum og heimasíðuni. Eitt fast hálvtíðarstarv varð sett í oktobur.

Skrivstovan hjá Málráðnum flutti í nýggj høli í septembur, og neyðugt var at innrætta hølini við nýggjari skrivstovu- og kt-útgerð, sum er orsøkin til stóru nýtsluna á kontu 14 og 15, keyp av vørum og keyp av útbúnaði. Málráðið keypti eisini tænastu í sambandi við at reka sosialar miðlar.

Útreiðslurnar til leigu og aðra fyrisiting hækkaðu í septembur í sambandi við, at samstarvsavtala varð gjørd við Fróðskaparsetrið. So samanumtikið er stórur partur av játtanini í 2025 brúktur til umskipan og flyting.

Síðani 2021 hava 100.000 kr. verið játtaðar til menning av teknmáli.

| ST.KONTA | HEITI | JÁTTAN 2025 | ROKNSKAPUR 2025 |
|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 2.241.000 | 1.528.103 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 127.000 | 576.693 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 20.000 | 69.854 |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | 0 | 6.864 |
| 63 | Vanligar flytingarinntøkur | 0 | – 17.193 |
| 71 | Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr) | 83.000 | 178.883 |
| | **Til samans** | **2.471.000** | **2.343.205** |

MÁLRÁÐIÐ

FØROYAPRENT